dylgiskjal 27

# Skógfriðingarnevndin



Argir hin Click here to enter a date.
Málsnr.: Click here to enter text.
Málsviðgeri: Michael Jacobæus

**Til Heilsu-og innlendismálaráðið**
**Hoyringarsvar viðvíkjandi uppskoti til lóg um, hvussu lívmargfeldið í náttúruni skal verða umsitið.**

Skógfriðingarnevndin hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið "Løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni.
Lógin leggur seg tætt upp at *Convention on Biological Diversity.* Lógin er úr yvirskipaðum sjónarhorni eitt frálíkt amboð, sum veitir nøkur tól til at verja og umsita náttúrugrundarlagið í landinum. At nútíðargera galdandi lóg metir nevndin vera eitt neyðugt amboð fram ímóti einari betri og meiri tíðarhóskandi vernd og umsiting av náttúrugrundarlagnum í Føroyum.
Grundleggjandi heldur nevndin tó, at tað fer at krevja stóra fíggjarliga og yrkisliga orku at umsita lógina, um endamálini í henni skulu verða rokkin, og um komandi kunngerðir skulu fáa eitt yrkisliga haldgott innihald. Uppskotið er sera stórætlað, og nevndin kann bera ótta fyri, at avmarkað orka fer? at fremja eintáttaðar loysnir. Ov eintáttað atlit at pørtum av lógini, t.d. at svartlista fremmand sløg, kann fáa óhepnar avleiðingar fyri grøna geiran.
**Yvirskipað**
Yvirskipað er torført at síggja neyvt, hvørjar avleiðingar lógin fer at fáa fyri virksemið hjá Skógrøktini. Virksemið er bygt upp sambært "Løgtingslóg um viðarlundir" frá 1953, ið sigur, at viðarlundir við tinglýstari friðingarkunngerð eru friðaðar. Endamálið við viðarlundaarbeiðinum hevur verið og er framvegis fyrst og fremst grundað á ynskið um at kanna møguleikarnar fyri trævøkstri og at nýta trævøkstur til samfelagsligt gagn. Um somu tíð hevur stovnurin ein plantuskúla, sum í høvuðsheitum gróðursetur og letur plantutilfar til at planta í viðarlundunum víða hvar í landinum og at selja einstaklingum. Sum so er talan bæði um eitt royndarvirksemi og um handilsskap við serligari skyldu at hava eitt rímiligt eftirlit við, hvussu tær plantur, ið verða plantaðar og seldar, hátta sær í umhvørvinum.
Grundleggjandi eru ikki-heimahoyrandi lívverur settar uttan fyri lógina (§5 stk 2). Ikki-heimahoyrandi lívverur eru ikki lýstar sum partur av føroyska veruleikanum, men sum grundleggjandi vandi. At fáast við ikki-heimahoyrandi lívverur er heldur ikki sett fram sum ein partur av føroyska veruleikanum, men útgjørt við fyrivarnum og avmarkingum. Tað harmar nevndina, at hugburðurin yvirskipað er avmarkandi (5.kapittul) og virksemi sum plantuskúlar, plantusølur, royndarvirksemi o.a. ikki er nevnt jaliga í lógini, hóast tað júst er sovorðið virksemi, sum hevur yrkisliga førleikan og dagliga sambandið við lívverurnar og tí møguleikan og skylduna at hava í hondum og síðan umsita møguligar avmarkandi ásetingar.
Tað kann tí undra, at privatir garðar, lundir og óskilmarkað dyrkað lendi (§28, stk. 2 og 3), verða mett sum lendi, har útseting kann fara fram uttan serliga lógarheimild.

Í høvuðsheitum umrøður lógaruppskotið ikki tílíkt virksemi. Ikki fyrr enn lógarkarmurin verður fyltur upp við kunngerðum, fer tað at bera til at síggja, hvørjar avleiðingar samhoyrandi lógirnar fara at fáa fyri virksemið hjá Skógrøktini. Fyri alt samfelagið hevur tað týdning at kunna fremja ta neyðugu granskingina í royndum við plantum. Ikki bara til viðarlundir, men eisini til urtagarðar, til lívdarplanting, til grønmetisvelting og til vanliga gleði og gagn til frama fyri landsins borgarar. Tær plantur, sum dagliga verða nýttar í ymiskum samanahangi, eru at kalla allar komnar inn av øðrum leiðum á jarðarknøttinum, men eru í dag ein partur av samleika okkara og óloysiliga bundin at bygd, bý og veltum lendi. Sum tann, ið umsitur tann grunn av ikki–heimahoyrandi plantutilfari og vitan, sum er knýtt at tí, er nevndin varug við, hvussu ikki-heimahoyrandi sløg í framtíðini verða umsitin.

**Her og nú. Føroyski veruleikin**

Ein ikki so lítil partur av føroyskum gróðri eru plantur, sum eru komnar higar uttaneftir, ið sum frá er liðið eru vorðnar ein partur av føroyskari flora. Sum útgangsstøði eru tað rættiliga grundleggjandi royndir at byggja eina náttúruverndarlóg á. Menniskjan ávirkar náttúruna her á landi á ein hátt, sum bæði er alheimsligur (byggir, grevur, ger urtagarðar o.a.) og á hættir, sum eru serstakliga føroyskir (seyðahald, dyrking o.a.) og eru treytaðir av veðurlag og mentan. Og náttúran, tað upprunaliga, lagar seg so líðandi til tað trýst, vit bjóða henni, og teimum tryggu støðum, sum vit lata upp.

Nevndin saknar eina støðu til tann veruleika, sum lógin skal virka í, fyri at hon skal verða nærstødd og skiljandi. Tann veruleiki, at meginparturin av náttúrugrundarlagnum er ávirkaður av menniskjanum, ger tað torførari at tala um "náttúru", um markið millum røktarlandslag og bygt landslag ikki verður nágreinað. Og tað er ikki nóg mikið at vísa til náttúrutilgongdirnar (sum jú so eisini virka í einari viðarlund ella í einum vegjaðara). At flokka náttúrugrundarlagið frá øllum tí, ið ónomið er, til tey ymisku stigini av menniskjaligari ávirkan (í Føroyum) er næstan ein treyt fyri einari lóg.

**Menniskjans ábyrgd og leiklutur sum umboð fyri framgongdina hjá ikki-heimahoyrandi sløgum**

Missurin av lívmargfeldi kann lættliga misskiljast sum ein spurningur um heimahoyrandi mótvegis ikki-heimahoyrandi lívverum. Framgongdin hjá ikki-heimahoyrandi lívverum er ikki bara ein spurningur um uppruna, men í avgerandi mun treytað av, um fyritreytirnar fyri lívi teirra eru til staðar. Til ber at skjalprógva, at framgongdin hjá ikki-heimahoyrandi sløgum er burturav treytað av, at menniskju koma uppí og eru til, ikki bara sum virkin lívveru-"innflytari", men eisini tí at tað, at menniskjan leggur upp í náttúrugrundarlagið, fyrireikar grundina til útbreiðsluna av innfluttum lívverum, og at menniskjaskapt virkisøki verða evnað. Byggivirksemi, órøkt landsløg, spilt jørð, dálking við livandi tilfari, óhóvsom nýtsla, virksemisumlegging og mong onnur viðurskifti, eru virksemi, sum av royndum kunnu gera livikorini hjá heimahoyrandi sløgum verri, men skapa gróðrarbotn fyri innfluttum sløgum í styttri ella longri tíð.

**Arbeiðið hjá nevndini í mun til lógaruppskotið**

At dyrka trø og runnar hevur ikki so langa søgu sum landbúnaðurin, men er tó kortini eitt fyribrigdi, ið er kyknað av vilja til at gagnnýta náttúrugrundarlagið landsins íbúgvum at

gagni. Í nýggjari tíð hevur plantingarmálið havt stóra ávirkan á bygda- og býarskapan og á, hvussu dyrkaða lendið í nútíðarsamfelagnum hevur ment seg. Nevndin saknar eina jaliga orðaða umrøðu av tí slagnum av virksemi.
Virksemið hjá nevndini er sum útgangsstøði bundið at

1. at leggja út øki til at gera viðarlundir.
2. at reka viðarlundir.

Síðan er tað áhugamál hjá nevndini at kunna gera royndir við ymiskum træ- og runnasløgum, ið hevur við sær

3. at kunna útvega plantingartilfar úr øðrum veðurløgum og gera royndir við tí undir føroyskum umstøðum
4. at hava atgongd til at kunna gróðurseta og selja plantingartilfar við støði í tilfari, sum longu er her á landi.

**Punkt 1.**
Í sambandi við punkt 1. er tað av áhuga hjá nevndini, hvat í lógini kann leggja avmarkingar á atgongd til viðarlundalendi. Sama, hvør ið ætlar sær at planta eina viðarlund, so skal ein viðarlundarverkætlan góðkennast. Sum vit lesa tað, eru tað í roynd og veru kommunurnar, sum sjálvar eru myndugleiki, og hava sum slíkar skyldu at tryggja sær, at tann aktuella verkætlanin ikki á nakran hátt nervar eitt vart náttúruslag. Lendið skuldi sambært galdandi lóg verið lagt út sambært einari góðkendari økisætlan, og tað hevði verið kommununnar skylda at útvega vitan um tey natúrligu viðurskiftini á staðnum. Nevndin lítur við jaligum eygum at, at tað at leggja viðarlundir av fær pláss í kommunuætlanini, og at tað verður gjørt út frá viging av fyriliti fyri náttúruvirðunum á staðnum. Um somu tíð kundi nevndin hugsað sær, at viðarlundir og annað royndarvirksemi varð jaliga nevnt í lógini.
**Spurningur:** Hvørji parametur eru galdandi fyri lýsing av náttúrusløgum? Nevndin metir tað neyðugt, at kanningar av náttúrusløgum og avleiðingarmetingar verða gjørdar eftir neyvt ásettum leiðreglum. Nevndin gleðir seg til, at hesir spurningar verða greiddir í kunngerðum og vegleiðingum í góðari tíð.
**Punkt 2.**
Viðvíkjandi rakstrinum hevur Skógrøkt sambært 2. kap. §6 skyldu at síggja til, at virksemið í viðarlundum og plantuskúla ikki eru til skaða fyri lívverumargfeldið. Sambært §11 hevur stovnurin eisini eina fíggjarliga ábyrgd í mun til tann skaða, sum virksemið kann hava við sær fyri umhvørvið. Sum eitt royndarvirki við fleiri ára royndum við at planta ikki-heimahoyrandi plantusløg, hevur eftirlit við førleikanum hjá plantunum at breiða seg verið ein sjálvsagdur partur av virkseminum. Grundleggjandi eigur lógin at seta treytir fyri stovnsett royndarvirksemi §27 og 28. Av tí at talan júst er um royndarvirksemi, má tað standa til teir ávísu stovnarnar sjálvar at lýsa og lúka stevnumið síni.
**Spurningur:** Viðvíkjandi §28 átti virksemið hjá Skógfriðinarnevndini at kunnað verið framt uttan serligt loyvi, men framvegis verið fevnt av ásetingunum í §25. Av tí at virksemið má vera hildið at vera góðkent, áttu viðarlundir og annað royndarvirksemi at

verið fevnt av lógargreinini. Hví er viðarlunda/royndarvirksemi ikki undantikið frá serligum loyvi til at seta plantur út smbr §28?

**Punkt 3.**

Skógrøkt er bundin av, at plantur verða fluttar inn, og tað er umráðandi hjá nevndini at varðveita rættin til at gera royndir við plantum. Í 4. kapitli eru eisini ásetingar í §27 og §28 um sølu og útseting, sum í høvuðsheitum ásetur, at loyvi til sølu og útseting skal landsstýrismaðurin geva. Tá ið tað snýr seg um innflutning at selja víðari, hevur tørvur leingi verið á einum ávísum innflutningseftirliti, og nevndin lítur við vælvild at tiltøkum, sum kunnu gera eftirlitið við innfluttum lívverum betri. Skógrøkt og nakrir aðrir plantuhandlar nýta plantupassskipanina frá ES, sum tryggjar eitt ávíst eftirlit við skaðaelvarum í innfluttum plantutilfari. Tað er tó eingin trygd fyri, at tilfar er sjúkufrítt. Vil ein tað, so má skipast eitt slag av egineftirliti við innflutningi. Nevndin tekur jaliga undir við, at gjørdar verða váðametingar av plantum, heimahoyrandi eins væl og innfluttum, sum kunnu skaða heimliga lívfrøðiliga margfeldið, og nevndin býður fegin fram royndir sínar við plantuvøkstri, ið er komin uttaneftir.

*Í §26 stk. 1 stendur "Loyvi kann ikki gevast, um orsøk er at halda, at útsetingin fer at hava við sær munandi óhepnar avleiðingar fyri tað lívfrøðiliga margfeldið".*

Tað ber ikki til at siga, hvussu ein planta fer at hátta sær í framtíðini. Tað ber til at royna hana og hava eftirlit við henni, men eingin kann vita, hvussu lívveran fer at laga seg til og bera seg at, um 10, 20 ella 100 ár. Til ber at kunna seg við royndir í øðrum londum, men tær kunnu ikki flytast yvir á føroysk viðurskifti og ikki nýtast sum fyridømi. So tað kann vera torført, um ikki ógjørligt, at veita nakra trygd. Í §26 stk. 2, um at seta út í náttúruna, er tað somuleiðis ógjørligt at siga nakað um avleiðingar av at seta lívverur út, uttan so at ein sjálvandi hevur nakrar royndir av virkseminum. Nevndin er kortini fullgreið um ábyrgd sína og fer til eina og hvørja tíð at vísa eftirsketni í sambandi við virksemið hjá nevndini sum viðmerkt í §25 stk. 1-4. Nevndin heldur tað vera gagnligt, um samstundis verður lagt upp til eitt kjak og eina kanning av, hvussu ikki-heimahoyrandi plantur ávirka umhvørvið. Nevndin skjýtur upp, at hugtakið "svartalista", sum verður nevnt í viðmerkingunum til lógina, verður útskift við tað meiri tíðarhóskandi hugtakið "váðameting".

**Spurningur:** Lógaruppskotið leggur upp til avmarkingar av innflutningi, nýtslu og sølu av plantum. Nevndin er her áhugað at vita, hvussu vitanargrundarlagið fyri nevnda grundarlag skal útvegast, og hvør myndugleikin er, ið letur vitanargrundarlagið.

**Punkt 4.**

Nevndin hevur ta áheitan, at verandi virksemi heldur fram uttan serligt loyvi og verður nágreinað í §28.

**Viðmerkingar til einstakar greinar:**

**Kap 1.§1**. Orðið "náttúra" kemur fyri í ymsum samanhangum og ymsum samansetingum sum t.d. náttúrumargfeldi, náttúruslag, náttúruskipan o.a. Grundleggjandi sakna vit eina allýsing av hugtakinum, ikki bara tí at lógarteksturin sum støði er tikin úr einum norskum samteksti, men eisini tí at fleiri staðir er neyðugt at avmarka hugtakið í mun til tað velta

landslagið og bygd øki og at skerpa týdningin. Og um neyðugt innføra eina sundurskiljing av "landslags" og teimum háttum, landslagið verður nýtt. Lógarinnar skilmarkingar í 1. kap § eiga, t.d. í seinni kunngerðum, at verða útbygdar við meiri sundurgreinandi og tíðarhóskandi skilmarkingum.

T.d.

Náttúrulandslag. Hagi, atkomilig náttúruøki
Røktarlandslag. Landbúnaður og traðir.
Býarlandslag (novel ecosystems) Urtagarðar, vegjaðarar, parkir, eftirgjørdir hamrar og annað mangt.

Vit kunnu siga, at føroyska náttúrugrundarlagið sum heild er ávirkað av menniskjaligum virksemi í ymiskum stigum. Frá fjøru til fjals hevur menniskjað sett sín dám á náttúruna í so stóran mun, at vit bara sum undantak kunnu fáast við eina náttúruskilmarking, sum fevnir um náttúru, sum er fulkomiliga ónomin.

Náttúra: upprunalig, ónomin av menniskjum (villiniland) – sum t.d. ógongdar skorar, hamrar og gjáir.
Náttúrligt: Sum kemur fyri í náttúruni, satt/rætt, íborin eginleiki, ósamansett.

"Føroya náttúru" 1. kap §1, er á mangan hátt eitt mentanarliga treytað heiti, sum vekur ymisk hugasambond, og er í hesum samanhangi ov óneyvt. Útgangsstøðið má vera náttúran, sum hon er í Føroyum, og eitt sundurgreinað náttúruhugtak má kunna rúma teimum menniskjaskaptu broytingum, sum tað fevnir um.
Neyðugt er at geva tí ans, at fatanin ella hugasambondini, sum knýta seg aftur at hugtakinum "náttúra", eru treytað av áskoðaranum, og har verða í dagsins samfelag lagdir ymiskir týdningar í orðið, alt veldst um, hvørji viðurskifti áskoðarin hevur við náttúruna: Býarmenniskja, bóndi og náttúrugranskari hava ymiska áskoðan á, hvat ið náttúra er.
Tí er neyðugt at skerpa skilmarkingina av náttúruhugtakinum.

**1. kap. §3 stk 2.**
*"Fremmand lívvera: lívvera, sum ikki hoyrir til nakað slag ella nakran stovn, sum finst natúrliga á staðnum".*

Her merkir natúrligt eftir øllum at døma upprunaligt. Men hvussu kann ein skilmarka uppruna í einum mentanarávirkaðum øki? Orðið natúrligt hevur nógvar merkingar, og tað er óheppið at nýta tað í einum lógarteksti. Ofta er orðið samheiti við "rætt", men formliga skilvíst ber ikki til at gera ta niðurstøðu, at nakað er rætt, tí at tað er natúrligt.

**§4, stk 1.**

Skotið verður upp at broyta orðingina, so at inntriv við menniskjaligum virksemi kemur í brennidepilin í staðin fyri broytingar í umhvørvi og náttúru. Dentur eigur at verða lagdur á menniskjans leiklut sum umsituri av náttúrugrundarlagið, í staðin fyri menniskjað, sum umboðari av einari ávísari náttúrumynd. Í tí liggur eisini ein virðing fyri teimum natúrligu tilgongdunum og tí lívmenningarliga elvinum.

**§5 stk 1.**
*"Miðast skal eftir at varðveita sløgini og teirra ílegumargfeldi við framtíðini í huga, og at sløgini skulu finnast í lívførum stovnum í sínum natúrligu útbreiðsluøkjum".*

Her skal nevnast, at tað ikki bara eru ikki-heimahoyrandi plantur, sum kunnu elva skaða á lívmargfeldið.
Fleiri heimahoyrandi sløg hava evnini at breiða seg út hagar, tey ikki hoyra heima natúrliga.

**§5, stk 2.**
*"Fyrisitingarmiðið í stk. 1 geldur ikki fyri fremmandar lívverur".*

Nevndin heldur annars samansetingina "fremmandar lívverur" vera óhepna. Orðið "fremmand" og "eksotisk", sum verða nevnd í viðmerkingini, hava bæði óhepnar virðisløðingar. Ikki-heimahoyrandi, ikki-upprunalig er eitt neutralari og yrkisliga beinraknari heiti. Ein munur átti eisini at verið gjørdur millum tilætlaða og ótilætlaða innflyting.

Innslødd Ótilætlað innleiðsla ST
Innflutt Tilætlað innleiðsla ST
Ikki upprunarlig/heimahoyrandi

**§25, stk**
Nevndin ger vart við, at tað eru ikki bara fremmandar lívverur, sum kunnu skaða lívverumargfeldið í einum ávísum øki. Heimlig sløg kunnu eisini verða spjadd í økjum, har tey ikki natúrliga hoyra til.

**§26 stk.2**
*"Er endamálið við innflutninginum at seta út í náttúruna, skal umsóknin um loyvi gera greiðu fyri, hvørji árin útsetingin kann hava á tað lívfrøðiliga margfeldið".*

Torført er at lúka kravið um eitt vitanarborið grundarlag, um tað snýr seg um eina lívveru, sum ikki er roynd fyrr.

**§27 stk.2**
*"Landsstýrismaðurin kann, tá ið plantur, sum settar verða út í privatar urtagarðar, eru undantiknar, í kunngerð áseta reglur um krøv um loyvi til at seta út lívverur, sum ikki frammanundan finnast natúrliga á staðnum".*

SKÓGFRIÐINGARNEVNDIN
c/o Umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar ·
Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

Hví eru privatir urtagarðar undantiknir?

§28. *stk 2-3)*
*Verður varsemiskyldan eftir §25 hildin, er loyvt uttan serligt loyvi eftir hesi lógini at seta út plantur í almennar grasagarðar, og onnur velt økir, um planturnar í lítlan mun kunnu væntast at breiða seg út um økið, og spjaðingin ikki kann væntast at hava óhepnar avleiðingar við sær fyri tað lívfrøðiliga margfeldið.*

Er tað eisini galdandi fyri útseting í sambandi við royndarvirksemi?

**Vegna Skógfriðingarnevndina**

**Michael Jacobæus**
**Skrivari í Skógfriðingarnevndini**